# Miðlamjarr

So fór Osama Bin Laden med Alla(h)
***Maður, 43 ár***

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein

*Halt kjaft, eg má hoyra uppá nógv møsn frá serfrøðingum*

Danski boksarin Brian Nielsen heldur lítið um tað, sum boksiekspertar hava at siga um hann (Ekstrablaðið)



*Avgjaldsflokkarnir standa saman um at skatta høvuðsvinnuna*

Løgtingsmaðurin Bjarni Djurholm við nýggjum politiskum hugtaki



Tann, sum segði, at pengar ikki gera teg lukkuligan, hevur ongantíð fingið frítíðarløn.
***Kvinna, 30 ár***



*Gevst við at klænka teg!*

Songkvinnan Jennifer Hudson hevur tapt seg 40 kilo, og nú heldur maðurin, at tað er nóg mikið



*Nú er brúk fyri blokkpolitikki*

Løgtingsmaðurin Edmund Joensen tosar um føroyskan politikk – ikki blokkin úr Danmark

Angri meg grønan, at eg ikki tók Arsenal-troyggjuna við umborð. ikki so galið at vera einsamallur Arsenal-fjeppari millum 28 mans í dag.. ;)
***Maður, 25 ár***

*Osama bin Laden er deyður*

Amerikanski forsetin Obama kunngerð deyðboðini fyri heiminum





*Seta vit tiltøk í verk, sum fara at føra fleiri streymslit við sær, rakar tað vinnulív og samfelag hart.*

Páll á Reynatúgvu, nevndarformaður í SEV, um møguligar sparingar (Sosialurin)



*Mangt bendir á, at vit politiskt eru við at flyta okkum móti einum vælferðarmodelli, ið er ætlað einstaklingum, ið longu frammanundan eru væl fyri*

Ingrid S. Henriksen